# Suðringur er aftur sum nýggjur

**Tað kostaði einar 10 miljónir krónur at umvæla lemmatrolaran, Suðring, eftir herviliga eldsbrunan í summar, sum kolaði alla verksmiðjuna upp. – Vit eru ógvuliga væl nøgdir við tað arbeiði, sum gjørt er – og við tað samstarv, vit hava havt við Tryggingarfelagið Føroyar, sigur reiðarin, Marner Lisberg**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Verksmiðjan umborð á Suðringi sá ikki tespilig út eftir herviliga eldin í summar. Eftir stóru umvælingina sær skipið nú aftur út sum nýtt*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Okkara elsti lemmatrolari, Suðringur, sum er bygdur í 1977, sær nú aftur út sum nýggjur eftir, at øll verksmiðjan kolaðist upp, meðan skipið lá við bryggju í Saltangará tíðliga í summar. Stívliga eitt ár, áðrenn eldur kom í skipið, var hagreiðingarlinjan á verksmiðjuni skift út og bygd av nýggjum. Tað var maskinverkstaðurin, FJM við Fjøruvegin í Runavík, sum hegnisliga gjørdi hetta arbeiði fyri reiðaríið hjá Suðringi.

### Væl nøgdir

Eftir herviliga eldsbrunan í summar, fór Suðringur aftur til fiskiskap síðst í august og Marner Lisberg, reiðari, sigur, at reiðarríið er sera væl nøgt við tað arbeiði, sum Skála Skipasmiðja hevur havt høvuðsábyrgdina av. Hann er eisini ógvuliga væl nøgdur við tað samstarv, sum hevur verið millum reiðaríið og Tryggingarfelagið Føroyar eftir, at skipið brendi.

- Saman við tryggingini gjørdu vit ta avtalu, at Skála Skipasmiðja skuldi vera høvuðsleverandørur í sambandi við umvælingararbeiði. Vit ynsktu, at FJM skuldi taka sær av hagreiðingarútbúnaðinum á verksmiðjuni, eins og KJ-Hydraulik skuldi taka sær av spølunum og øllum tí hyldrauliska. KJ umboðar nevniliga norsku Rapp-spølini, sum Suðringur hevur.

Marner sigur, at avtalan var, at skipið skuldi verða liðugt um ólavsøkutíð, og einar tvær vikur seinni vóru teir klárir at loysa.

### Stórarbeiði

- Hetta hevur verið eitt stórt arbeiði, tí skipið fórst so illa í eldinum. Umframt at øll verksmiðjan er skift út, er høvuðstalvan til el-skipanina skift og stórur partur av tí elektriska annars. El-Service á Skála hevur tikið sær av tí elektriska.

Reiðarin sigur, at messan er eisini gjørd av nýggjum.

- Vit høvdu við árunum gjørt nógv við skipið, og nú skipið hevur fingið hesar umvælingar og nýgerðir, sær Suðringur út sum nýggjum, sigur Marner.



*Marner Lisberg, reiðari, var í Saltangará og hugdi at brendu verksmiðjuni longu morgunin eftir, sum eldur var í skipinum náttina fyri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hann vísir á, at onkrir trupulleikar hava verið við spølunum, síðan skipið loysti aftur, men hann heldur, at hetta er við at verða undir landi nú. Spølini umborð á Suðringi eru ikki skift, men eru tey somu sum undan eldinum.

- Suðringur hevur fiskað alla tíðina, síðan tað fór í vinnu aftur. Talan hevur sum heild verið um smáting, eitt nú pakningar og annað í hydraulisku skipanini, sum er skift av nýggjum.

### Tjena hampiligt

Reiðarin sigur, at tað er stríggið at reka lemma-trolararnar í hesum tíðum, nú oljan er vorðin so ómetaliga dýr, men hann vísir á, at manningin hevur tjent hampiliga væl.

Skipari umborð á Suðringi síðan 1995 hevur verið Jan Olsen úr Trongisvági, ið er bróður Egil Olsen, sum føroyingar eitt nú kenna frá verkætlanini í Lettlandi.

- Jan, sum er maður í bestu árum, hevur siglt við Suðringi í mong Harrans ár – og í fleiri ár, áðrenn hann gjørdist skipari, sigur Marner Lisberg.

Umvælingararbeiði umborð á Suðringi hevur kostað einar 10 miljónir krónur.

# Søluprosessin av P/F Faroe Seafood fer nú í gongd

**Framtaksgrunnur Føroya og P/F Faroe Seafood siga, at arbeiðið í samband við søluna av P/F Faroe Seafood verður fyriskipað av Corporate Finance hjá KPMG í Keypmannahavn, og hetta arbeiðið verður skipað í trimum stigum**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í tíðindaskrivi boða Framtaksgrunnur Føroya og P/F Faroe Seafood nú frá, at grunnurin í næstum fer undir søluprosessina av P/F Faroe Seafood.

- Sølan verður skipað sum ein kontrollerað uppboðssølu prosess, har møguligir keyparar fáa høvi at bjóða upp á samlaða partapeningin í P/F Faroe Seafood, sum sagt verður í skrivinum.

Dagmar S. Joensen er nevndarformaður í Framtaksgrunni Føroya.

Hon sigur, at endamálið við, at Framtaksgrunnur Føroya hevur átt P/F Faroe Seafood er nú nátt við tað, at felagið er vorðið fremsti føroyski framleiðarin og marknaðarleiðarin av fyrsta floks fiskavørum á evropeiska marknaðinum.

- Felagið hevur í dag góðar vakstrarmøguleikar í framhaldandi at troyta tey virðir, sum eru vorðin støðið undir virkseminum og við at luttaka í konsolideringini í evropeiska fiskiídnaðinum. Til tess at fáa fulla nyttu av møguleikunum í felagnum og fremja hesar í verki, er neyðugt við einum sterkum rakstrarligum og fíggjarligum støði, vísir Dagmar S. Joensen á.

Óli M. Hansen er nevndarformaður í P/F Seafood.

Hann sigur, at síðan november 2004, tá ið avgjørt var at leggja P/F United Seafood og P/F Faroe Seafood saman, hevur miðvíst verið arbeitt við at samskipa virksemið í hesum báðum feløgum.

- Felagið hevur fingið nýggjan og einfaldari bygnað, og framleiðsluútbúnaðurin er framhaldandi optimeraður. Í dag sær Faroe Seafood fram til at fáa nýggjan eigara, sum hevur eitt sterkt rakstrarligt og fíggjarligt støði, sigur Óli M. Hansen.

Framtaksgrunnurin og P/F Faroe Seafood siga, at arbeiðið í samband við søluna verður fyriskipað av Corporate Finance hjá KPMG í Keypmannahavn, og hetta arbeiðið verður skipað í trimum stigum, sum Sosialurin fer at venda aftur til í komandi viku.